# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Naser Khader er ov ógreiður sum talsmaður hjá Ny Alliance, og Anders Samuelsen skal loysa hann av*

*(valfelagsformaður hjá NA)*

# Sinnissjúkur maður ætlaði at myrða Filippu Reinfeldt

**Svenska løgreglan hevur tikið ein mann, sum hevði lagt ætlanir um at beina fyri svensku forsætisráðharrafrúuni**



*Felippa og Fredrik Reinfeldt*

Tann 42 ára gamli maðurin er nú á einum sinnissjúkrahúsi í býnum Huddinge, og væl mannað løgreglulið standa á varðhaldi á sjúkrahúsinum.

Undir avhoyringum hjá trygdarløgregluni Säpo skal maðurin hava viðgingið, at hann ætlaði at keypa sær eina skammbyrsu, sum hann skuldi brúka til at myrða Filippu Reinfeldt við. Felippa Reinfeldt er gift við svenska forsætisráðharranum, Fredrik Reinfeldt.

Løgreglan sigur, at maðurin býr í einari íbúð, sum er nakrar fáar hundrað metrar frá arbeiðsplássinum hjá Felippu Reinfeldt í Handverkargatan í miðbýnum í Stockholm. Tá løgreglan rannsakaði íbúðina, kom hon fram á kort av miðbýnum og tekningar av nøkrum bygningum har um vegir.

Sambært Aftonbladet visti Felippa Reinfeldt einki um drápsætlanina, tá blaðið ringdi til hennara í gjárkvøldið, og sum skilst hevði løgreglan heldur ikki kunnað mann hennara.

### Sinnissjúkur

Säpo sigur, at tann 42 ára gamli maðurin hevur havt samband við sálarfrøðingar í fleiri ár. Fyrst í hesum mánaðinum var hann so illa fyri, at læknarnir gjørdu av, at hann skuldi tvingsilsinnleggjast, og tað var tá, at hann avdúkaði sínar ætlanir um at beina fyri Felippu Reinfeldt. Millum annað greiddi hann frá, at hann hevði savnað sær 5.000 svenskar krónur, sum hann skuldi keypa eina skammbyrsu fyri.

Maðurin skal eisini havt sagt, at hann væntaði at blíva tikin aftan á morðið. Hann hevði kannað, hvørja revsing hann kundi fáa sambært svensku revsilógini, men hann var ikki vorðin skelkaður av tí, sum hann hevði lisið har.

- Mín gerandisdagur verður ikki so nógv øðrvísi, um eg skal sita í fongsli, skal maðurin hava sagt.

# Triði hvør tinglimur er kvinna

**Av teimum 179 umboðunum í Fólkatinginum eru 67 kvinnur**

Kvinnurnar eru eins val ella illa umboðaðar í Fólkatinginum aftan á valið týsdagin, sum tær vóru undan valinum.

Av teimum 179 tinglimunum eru 67 kvinnur. Tað svarar til 37 prosent, og hetta er fjórða valið á rað, at kvinnurnar hava fingið júst 37 prosent av tingsessunum.

Tað er eitt sindur ymiskt, hvussu nógvar kvinnur eru valdar fyri teir einstøku flokkarnar. Hjá Vinstra og Sosialdemokratunum eru 33 prosent av tinglimunum kvinnur og hjá Danska Fólkaflokkinum 36 prosent. Av tinglimunum hjá Ny Alliance eru 40 prosent kvinnur, hjá Konservativa Fólkaflokkinum og Radikala Vinstra eru 44 prosent kvinnur, hjá Sosialistiska Fólkaflokkinum 48 prosent, og av teimum fýra umboðunum hjá Eindarlistanum eru tvær kvinnur.

Kynsbýtið er øðrvísi millum tey fýra umboðini úr Føroyum og Grønlandi. Har er Juliane Henningsen úr grønlendska IA einasta kvinnan.



*Fyri fyrstu ferð er ein muslimsk kvinna vald í Fólkatingið. Tað er Özlem Sara Cekic, sum varð vald á listanum hjá Sosialistiska Fólkaflokkinum*

## STUTT SAGT

### Ísrael má lata fyri frið

Á einum fundi við jødiskar niðursetumenn á Vestara Áarbakka í gjár segði Ehud Olmert, forsætisráðharri, at skal Ísrael gera ein friðarsáttmála við palestinar, noyðist landið at slaka á summum økjum. Forsætisráðharrin gjørdi tó vart við, at hann fer ongantíð at góðtaka, at Ísrael skal lata frá sær tann partin av Vestara Áarbakka, sum søguliga er partur av Ísrael. Hann segði, at hetta hava bæði palestinar og amerikanar fingið at vita. Fundurin við niðursetufólkini var tann fyrsti av fleiri, og hesir fundirnir eru liður fyrireikingunum til eina ísraelska-palestinska friðarráðstevnu, sum verður í USA.

### Russar úr Georgia

Russland hevur havt hermenn í grannalandinum Georgia, líka síðani Sovjetsamveldið datt sundur, men nú eru teir seinastu russisku hermenninir farnir haðani. Tað sigur verjumálaráðið í Moskva. Tíðindini fáa uttan iva góða móttøku í Georgia, tí hava hava fólk alla tíðina verið ímóti, at Russland hevur havt hermenn í landinum. Russiski generalurin Aleksej Maslov sigur, at russisku hermenninir eru nú partur av einari herdeild, sum skal tryggja fið í økinum Suður-Osetia, sum tók seg burtur úr Georgia, stutt eftir at Sovjetsamveldið var dottið sundur í 1991.

### Bretar avlíva fugl

Heilsumyndugleikarnir í Bretlandi hava avlívað umleið 24.000 høsn og kalkunir í einari roynd at forða fyri, at tað vandamikla fuglakrímið skal breiða seg. Myndugleikarnir staðfestu fyrradagin, at kalkunir á einum bóndagarði har eysturi í landinum vóru smittaðar við tí vandamikla slagnum av figlakrími H5N1. Sunnudagin staðfestu myndugleikarnir H5N1 á einum øðrum garði, og har vórðu 6.500 kalkunir avlívaðar alt fyri eitt. Samstundis hava myndugleikarnir avbyrgt teir smittaðu bóndagarðarnar, sigur BBC.